## Skúlin á Fossánesi

# Lærarastarv

Vegna barnsburðarfarloyvi verður søkt eftir lærara 19t/v.(frá 1.8 .2002 27 t/v)

Starvið er tíðaravmarkað: frá 2.2 til 31.12.2002.

Lærugreinir: Føroyskt 1., 2. flokki , Danskt 5., 6. flokki, Landalæra í 7. flokki , Hondarbeiði og Bókasavn.

Nærri upplýsingar fáast vit at venda sær til skúlan 45 21 20

Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið.

Umsóknir við ljósrit av prógvi og møguligum viðmælum skulu verða skúlastýrinum í hendi seinast fríggjadagin 18. januar 2002.

**Skúlastýrið fyri Skúlan á Fossánesi**
v/ John Kára Jacobsen
740 Hvannasund

# Adventistaskúlin

Børn, sum skulu í 1. fl. í Adventistaskúlan eftir summarfrítíðina, verða innskrivað hósdagin 10. jan. frá kl. 16-17.

Havið dóps- ella navnaseðil við. Vegna serligar umstøður eru nøkur fá pláss eftir.

**Adventistaskúlin tlf. 313260**

# Kvinna søkist til handil

Vit søknast eftir tilkomari kvinnu til handilin at byrja skjótast tilber

**Arbeiðtíðirnar eru hesar:**
kl. 05.30 - 13.15
kl. 13.00 - 19.00
allar dagar í vikuni

**Frants Restorff**
Tórsgøta 13
Tlf. 311060
Postmoga 41
110 Tórshavn

frants restorff

# Kunngerð

## um framløgu av serstakari byggisamtykt fyri Kvívíkar Kommunu

Sambært løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir við seinni broytingum, verður við hesum gjørt kunnugt, at uppskot til broyting av byggisamtykt/býarskipan fyri Kvívíkar Kommunu, samtykt á fundi tann 27. august 2001, verður lagt fram til almenna eftirskoðan á kommunuskrivstovuni frá 9. januar 2002 til 30. januar 2002, báðir dagar íroknaðir. Uppskotið fevnir um øki Úti á Brúnum, ið verður lagt út til vinnu- og ídnaðarøki, og øki matr. nr. 132b, ið verður lagt av til sethús.

Møgulig mótmæli og/ella broytingaruppskot, sum skulu vera skrivlig, mugu vera kommununi í hendi í seinasta lagi 9. apríl 2002.

Skrivstovan er opið soleiðis:
Mána-, miku- og fríggjadag frá kl. 11.00 til 13.00 og mikudag frá kl. 18.00 til 20.00.

# Kunngerð

## um framløgu av broytingaruppskoti til byggisamtykt fyri Leirvíkar Kommunu

Við heimild í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954, seinast broytt 13. mai 1997, verður við hesum boðað frá, at bygdarráðið á fundi 22. november 2001 hevur samtykt at gera broytingar í Byggisamtyktini og at hesar verða lagdar fram til almenna eftirskoðan á Kommunuskrivstovuni frá 04. januar 2002 til 25. januar 2002, báðir dagar íroknaðir.

Uppskotið umfatar at:
Broyta økið, sum umfatar grótbrotið og nakað av økinum uttanum til ídnaðarøki, nevnt C4.

Møgulig mótmæli móti uppskotinum og broytingaruppskot skulu skrivliga vera bygdarráðnum í hendi í seinasta lagi 04. apríl 2002.

**Leirvíkar Kommuna**
FO 520 Leirvík

# Skeið
## í taluteknikki og fundarleiðslu

verður í hølunum hjá Klaksvíkar Húsmøðrafelag í Bøgøtu 3, Klaksvík, leygardagin 19. jan. 2002, kl. 09.00–18.00.

Luttøkugjaldið er 100 kr. fyri hvønn, íroknað mat fyri dagin.

Tilmelding á tlf. 456774, 224473 ella 455420 í seinasta lagi hósdagin 17. jan. (Sí tíðindabræv okkara).

# Snikkaralærlingur

Vit søknast eftir lærlingi ar byrja sum skjótast, sum bygningssnikkari ella sum maskinsnikkari.

Vit bjóða eina spennandi útbúgving í eini vinnu, sum er í vøkstri. Lærutíðin er 3 ár og 9 mánaðir hjá bygningssnikkarum og 4 ár hjá maskinsnikkarum. Møguleiki er fyri framhaldandi starvi sum sveinur eftir lokna lærutíð.

Lønin verður hægri enn avtalan ímillum handverkarafeløgini og meistarafelagi.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Dánjal Paula Poulsen ella Berg Rasmussen

**Vatnsoyra Snikkaravirki pf.**
FO-385 Vatnsoyrar • Telefon 33 21 77 • Fax. 33 31 66
E-mail: vs-fg@h-window.fo • Heimasíða: www.h-window.fo

*Vatnsoyra Snikkaravirki pf. er móðurfelag hjá Føroya Gluggi pf. í Miðvági. Vit framleiða vindeygu og hurðar. Feløgini hava felags skrivstovu/ avgreiðslu. Í løtuni eru vit 23 starvsfólk.*

# Ognirnar hjá Fjallbrúður til sølu

**Matr. nr. 216a, Vágur**
Grundøkið: 316 m²
Húsavídd: 118,09 m²
Bygningur í 3 hæddum.

**Kjallarahæddin:**
1. Skrivstovuhølir við tilhoyrandi kantinu, goymslurúm, wc.
2. Skrivstovuhølið við tilhoyrandi wc.

**Miðhæddin:**
Skrivstovuhølið, gangur, køk, wc, stórur salur.

**Loftshæddin:**
Goymslurúm.

**Matr. nr. 216b, Vágur**
Grundøkið: 496 m².

Skrivlig boð uppá ognirnar skulu sendast til:

**Arbeiðskvinnufelagið Fjallbrúður**
Postboks 56
FO-900 Vágur

Felagið tilskilar sær rætt til ikki at taka av teimum innkomnu boðunum, um hesi ikki eru nøktandi.

Vit takka fyri tey klæðir vit hava fingið í 2001, sum alt er sent víðari. Serlig tøkk til fólkini í Vági, ið hjálpt hava og til SKIPAFELAGIÐ FØROYAR fyri teirra beinasemi.

Vit byrja aftur at taka móti klæðum mikudag kl. 1900-2100 – ein hjálpandi hond afturat, er eisini vælkomin.

**Reyði Krossur Føroya**

Sosialurin -har tað hendir



**Starv**

# Lærlingur til verkstaðið

Á verkstaðnum, sum er undir Farmaleiðum, er eitt starv sum lærlingur leyst at seta.

**Starvið fevnir um**
Viðlíkahaldsarbeiði uppá lastbilar, bussar o.a. útbúnað.

**Førleikakrøv**
- Arbeiða sjálvstøðugt og hava lætt við at samstarva
- Góðan røkjuskap

**Setanartreytir**
Setanartreytir verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag.

**Umsóknir**
Áhugaði skulu senda umsókn til:
***Strandfaraskip Landsins***
att. Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn

og skulu vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi 1. februar 2002, kl. 10:00.

Um tú ynskir nærri upplýsingar, kanst tú venda tær til Heina á Borg, farmaflutningsleiðara, á tlf. 343060 ella e-post: hab@ssl.fo

STRANDFARASKIP LANDSINS

*Høvuðsuppgávan hjá fyritøkuni er at lúka landsins tørv á innanlanda fólka- og farmaflutningi, og skal fyritøkan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krøv um eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skjótleika.*

*Árliga rakstrarætlanin hjá Strandfaraskipum Landsins javnvigar við yvir 150 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, herav umleið 155 operatørar. Talið á flutningsanleggum er 11 skip, 40 bussar og 15 lastbilar. Flutningsuppgávurnar fevna um alt landið.*

# Nú klippur Marjun eisini á Salong Bronx



**Vit ynskja henni vælkomna**

Salong BRONX Lissi Mouritsen
J. Broncksgøta 34
FO-100 Tórshavn
tel 313090

Visti tú ikki tað? Sosialurin

**Mentamálastýrið**
**Yrkisdepilin**

# Lærlingur

***Læruplássið***
Læruplass sum skrivstovulærlingur er leyst at søkja í Mentamálastýrinum við høvuðsstarvi í **Yrkisdeplinum.**

Talan er um eitt áhugavert og fjølbroytt arbeiði við møguleikum fyri persónligari og fakligari menning og skiftandi uppgávum á undirvísingar- og mentanarøkinum.

**Uppláeringin**
Í uppláeringini hevur lærlingurin skrivligt og munnligt samskifti við læruplass, lærlingar, yrkisskúlar og onnur við serligum atliti at starvsøkinum hjá Yrkisdeplinum, umframt at arbeiða við øllum vanligum fyrisitingarligum uppgávum.

**Førleikakrøv**
Vit vænta okkum, at umsøkjari hevur HH, HT, HIF, HF, students- ella aðra javnsetta miðnámsútbúgving, umframt at hava góðan kunnleika til føroyskt mál og góð samstarvsevni.

**Setanar- og lønartreytir**
Viðkomandi verður settur eftir reglunum um skrivstovulærlingar í lønarsáttmálanum millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið. Viðmerkjast skal, at setanarøkið fevnir um alt aðalstýrið.

**Umsókn**
Umsóknin skal vera Yrkisdeplinum í hendi í seinasta lagi 31. januar 2002. Lærlingurin kann byrja skjótast til ber. Umsókn við prógvum o.ø. skulu sendast til:

**Yrkisdepilin**
Postrúm 3279
110 Tórshavn

**Upplýsingar** um virksemið hjá Mentamálastýrinum og Yrkisdeplinum eru at finna á heimasíðunum: www.mms.fo og www.yrkisdepilin.fo.

Ynskjast fleiri upplýsingar, ber til at ringja til Petur Oluf Hansen, fyrisitingarleiðara, tlf. 355050.

***Mentamálastýrið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.*

***Yrkisdepilin**, sum er sjálvstøðug fyrisiting í Mentamálastýrinum, hevur ta yvirskipaðu umsitingina av arbeiðsmarknaðar- og yrkisútbúgvingarmálum, herímillum at vera fyrisiting hjá Yrkisútbúgvingarráðnum og yrkisnevndunum. Yrkisdepilin umsitur eisini ávís málsøki hjá stýrinum.*

# Lærlingur til Saab-verkstaðið

Pláss er fyri lærlingi til mekaniska verkstaðið hjá Saab. Koyrikort krevst.

Vendið tykkum til Heðin Weihe ella Klaus Dahl.

**P/f Meinhardt Arge**
tlf. 345400

# Tavan

Søkt verður eftir reinskerarum at byrja beinanvegin. Arbeitt verður í tveimum vaktum.

**Tavan**
520 Leirvík
Tlf. 213155 · Fax 443377

Sosialurin
www.sosialurin.fo